# Læran hjá Laksáfoss

**Magni Laksáfoss hevur einans verið landsstýrismaður í fíggjarmálum í gott eitt hálvt ár, men hóast hetta hevur hann megnað at kollvela politisku skipanina. Summi elska hann, og summi orka ikki fyri honum. Hann verður mettur at vera ein erligur politikari – ein, ið torir at siga tingini bart út. Men hetta er jú í sjálvum sær ósambæriligt við tann partin av føroyskum politikki, ið snýr seg um rossahandlar og duldar dagsskráir**

VELJARAKANNING
*Sámal Matras Kristiansen, samfelagsfrøðingur*



Magni Laksáfoss fekk eitt rættiliga gott fólkatingsval, ið kann benda á eitt líknandi gott val til løgtingsvalið. Um populariteturin hjá honum verður staðfestur við eitt løgtingsval, so er neyvan nakar ivi um, at hann framyvir telist millum sterku menninar í Sambandsflokkinum. Verður lagt afturat, at Sambandsflokkurin møguliga verður størsti flokkur á tingi, so er Magni Laksáfoss nærum óundansleppiligur í einum komandi landsstýri.

Tí hava fleiri av mótstøðumonnum hansara hesa seinastu tíðina roynt at kasta runu á hvítu skjúrtuna hjá Magna Laksáfoss. Hann og hansara meiningar mugu dálkast mest møguligt, soleiðis at hann ikki kemur at standa so sterkur eftir løgtingsvalið. Og higartil hevur dálkingartaktikkurin serliga ligið í samanberingini við Bárð Nielsen, ið eftir øllum at døma hóskaði betri inn í krammið hjá hinum samgonguflokkunum.

## Einans norðoyingar vilja skattalætta

Serliga er tað skattaspurningurin, ið liggur í buktini. Bárður Nielsen arbeiddi sum fullblóðs liberalistur fyri at minka um skattatrýstið. Tað er sjálvandi nakað, ið vanliga vil hóska væl inn í politisku ynskini hjá høgravendum veljarum. Men Magni Laksáfoss er hugsjónarliga nærum tað umvenda av sínum undangongumanni. Magni Laksáfoss hevur fingið hugsjónina um afturhaldandi og regulerandi fíggjarpolitikk inn í føroyska kjakið, og tað er nakað, ið hóskar betri til politisku ynskini hjá vinstravendum veljarum.

Ein veljarakanning, ið Fynd hevur gjørt fyri Sosialin, vísir, at heili 65 % av veljarunum, ið hava tikið støðu, ynskja ikki skattalætta í komandi valskeiði, meðan 35 % hinvegin ynskja skattalætta. Serliga er tað í Norðurstreymoy og Suðurstreymoy, at mótsøðan móti skattalætta er størst. Her ynskja umleið 7 av 10 ikki skattalætta. Men eisini í Suðuroy, Sandoy, Vágunum og Eysturoy ynskja umleið 6 av 10 ikki skattalætta.

Einans í Norðoyggjum er skattalættin høgt í kurs. Her ynskja heili 64 % av fólkafloksveljarunum, ið hava tikið støðu, at skattalætti skal latast í komandi valskeiði.

Sí talvu

Tað er ikki nakar avgerandi munur á kynunum viðvíkjandi skattalætta. Tó eru tað nakrar fleiri kvinnur enn menn, ið siga seg ynskja skattalætta. 4 út av 10 kvinnum ynskja skattalætta, meðan 3 av 10 kvinnum ynskja skattalætta í komandi valskeiði.

## Heldur rakstur enn íløgur

Men eitt er at tálma vøksturin við at varðveita skattatrýstið og harvið at leggja hald á part av peningarenslinum í samfelagnum. Onnur fíggjarpolitiska skrúvan er almenna nýtslan. Tá búskapurin byrjar at kóka yvir, eigur tað almenna at halda aftur við rakstri og íløgum. Spurningurin er so bara um man skal velja at spara í rakstri, íløgum ella í báðum.

Magni Laksáfoss gjørdi seg kendan upp á sítt uppskot um at útseta Sandoyartunnilin til verri tíðir. Í farnu samgonguni var tó ikki semja um hetta, og mett varð rættari eisini at hyggja eftir sparingum í rakstrinum. Trupulleikin við hesi støðutakan er tó, at tað mesta av rakstrinum er lógar- og sáttmálabundið og tískil ikki kann broytast frá degi til dags. Íløgur kunnu hinvegin gerast, strikast ella avtakast við stuttum skoðbráði.

Og tað tykist vera gingið upp fyri veljarunum, at tað ikki er í rakstrinum, at sparast skal, men heldur í íløgunum. 62 % av teimum spurdu, ið hava tikið støðu, halda at tað heldur eigur at sparast í íløgum enn í rakstri. Serliga í Norðurstreymoy er hetta tíðiligt. 7 út av 10 stuðla hesum sjónarmiði. Men eisini í Suðuroy, Vágunum, Suðurstreymoy, Eysturoy og Norðoyggjum eru umleið 6 út av 10, ið, ið heldur vilja spara í íløgum enn í rakstri.

Í so máta hevur fíggjarlógaruppskotið rakt rætt, tí



### Eigur komandi landsstýri at geva fleiri skattalættar?

| Øki | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Suðuroy | 41% | 59% |
| Sandoy | 40% | 60% |
| Suðurstreymoy | 29% | 71% |
| Norðurstreymoy | 26% | 74% |
| Vágar | 39% | 61% |
| Eysturoy | 37% | 63% |
| Norðoyggjar | 64% | 36% |

*Tey, ið hava svarað "veit ikki", eru ikki við í prosentútrokningini*

### Eigur landið heldur at spara í almenna rakstrinum enn í íløgum í vegir og tunnlar?

| Øki | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Suðuroy | 34% | 66% |
| Sandoy | 60% | 40% |
| Suðurstreymoy | 37% | 63% |
| Norðurstreymoy | 30% | 70% |
| Vágar | 36% | 64% |
| Eysturoy | 39% | 61% |
| Norðoyggjar | 43% | 58% |

*Tey, ið hava svarað "veit ikki", eru ikki við í prosentútrokningini*

### Eigur landið heldur at spara í almenna rakstrinum enn í íløgum í vegir og tunnlar?

| Siga seg velja | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Fólkaflokkin | 49% | 51% |
| Sambandsflokkin | 38% | 62% |
| Javnadarflokkin | 27% | 73% |
| Sjálvstýrisflokkin | 23% | 77% |
| Tjóðveldisflokkin | 39% | 61% |
| Midflokkin | 45% | 55% |
| Miðnámsflokkin | 38% | 63% |

*Tey, ið hava svarað "veit ikki", eru ikki við í prosentútrokningini*

### Eigur komandi landsstýri at geva fleiri skattalættar?

| Siga seg velja | Ja | Nei |
|---|---|---|
| Fólkaflokkin | 42% | 58% |
| Sambandsflokkin | 52% | 48% |
| Javnadarflokkin | 32% | 68% |
| Sjálvstýrisflokkin | 38% | 62% |
| Tjóðveldisflokkin | 21% | 79% |
| Midflokkin | 33% | 67% |
| Miðnámsflokkin | 14% | 86% |

*Tey, ið hava svarað "veit ikki", eru ikki við í prosentútrokningini*

*Úrslit av veljarakanning, sum Fynd gjørdi fyri Sosialin týsdagin og mikudagin í síðstu viku*